## *Málningaframsýning á páskum*

Lions Club Eysturoy skipar fyri árligu málningaframsýningini

**1. og 2. páskadag í Runavíkar skúla**

Opið verður báðar dagarnar frá kl. 15 til 20.

Kostnaður kr. 40,-. Innkomni peningurin fer til góðgerandi endamál.

Atgongumerkið (myndaskráin) er samstundis lutaseðil uppá ein málning.

Lutaseðlar uppá aðrar málningar verða seldir báðar dagarnar.

Framsýningi verður sett 1. páskadag kl. 15 av Fríðgerð Heinesen, borgarstjóra í Leirvík. Limir úr Norðljómi spæla eisini nøkur stykkir.

**Lions club Eysturoy**

## Pedagogur/ stuðulsfólk

Søkt verður eftir stuðli til barnagarðin í Leirvík, at byrja 1. mai 2006.

Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna.

Arbeiðstíðin hjá stuðlinum verður at stimbra einum barni motoriskt og annars vera um barnið í gerandisdegnum.

Arbeiðið verður gjørt í samstarvi við familjuna.

Ynskiligt er, at tann ið settur verður, hevur hóskandi útbúgving ella royndir.

Setan sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran, Gunnvu Thomsen á tlf. 743125.

Umsóknir saman við møguligum avritum av prógvi skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. apríl 2006.

**Leirvíkar Kommuna**
**Postboks 42**
**520 Leirvík**

## Handilslærlingur

**til Teymavirkið í Runavík**

**Teymavirkið** í Runavík sóknast eftir handilslærlingi at byrja skjótast møguligt. Størsti parturin av fyrsta árinum fer fram í Leikabúðini.

**Vit bjóða** eitt starv á einum fjølbroyttum arbeiðsplássi í støðugari menning, har samstarv við arbeiðsfelagar, veitarar og kundar er av alstórum týdningi.

**Vit vænta,** at tú hevur FHS- ella HH-prógv. At tú ert fyrikomandi, arbeiðssamur og fleksibul persónur, sum dugir væl at samstarva, men eisini arbeiða sjálvstøðugt. Og at tú hevur hug og áræði at gerast partur av okkara arbeiðsdegi, sum við hvørt er eitt sindur strævin, men hóast tað stuttligur.

**Umsókn** við avriti av prógvum, møguligum ummælum og CV skulu verða Teymavirkinum, Boks 210, 620 Runavík, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 28. apríl 2006.

**Meiri** fæst at vita við at venda sær til Hannu á R. Lamhauge á tlf. 44 93 93.

*Teymavirkið er einasta fyritøka í Føroyum, ið framleiðir línu, teymar og togverk. Teymavirkið í Runavík, Snørisvirkið í Klaksvík og Glæman í Tórshavn eru skipshandlar, har fiskireiðskapur, trygdarútgerð, arbeiðsklæði og frítíðarklæði eru at fáa. Teymavirkið hevur deild við búnýti og gávum í Runavík og eigur og rekur eisini Leikabúðina. Í alt eru 30 fólk í starvi hjá samtakinum.*

### Aðalfundur í felagnum

## Blóðgeva

Aðalfundur felagsins verður mikudagin 19. apríl kl. 19.00 í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum. Skrá smb. viðtøkum felagsins.

Viðtøkurnar kunnu lesast á okkara heimasíðu: www.gevidblod.fo

Á fundinum heldur Ólavur Samson fyrilestur um altjóða blóðgevarafelagsskapin FIODS.

Hann umrøður m.a. hvønn týdningin føroyskur limaskapur í FIODS kann koma at hava fyri okkum.

Eftir fundin verður undirhald við vísusangaranum Hanusi Johansen.

Eisini verður, sum vanligt, borðreitt við mati og drekka.

Gevð gætur at øll, ið eru skrásett sum blóðgevar á Landssjúkrahúsinum, eru limir í felagnum.

Møtið fjølment.

**Nevndin**

### Tannrøktari

Søkt verður eftir tannrøktara at arbeiða 1/2 tíð á Tannlæknastovuna á Skála, til setan 1. mai 2006 ella eftir nærri avtalu.

Á Tannlæknastovuni starvast ein tannlækni og tveir klinikkassistentar. Árliga verða viðgjørd uml. 500 børn og ung millum 0 og 16 ár. Framyvir er ætlanin at gera eitt betri og meira skipað fyribyrgjandi arbeiði innan tannrøktina í økinum.

Lagdur verður stórur dentur á góða tænastu og góð samstarvsevni.

Løn og setanartreytir sambært galdandi sáttmála.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jákup Foldbo, leiðara á Sosialu deild á tlf. 417000.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi 25. apríl 2006.

**Runavíkar Kommuna**
Postsmoga 139
Heiðavegur · 600 Saltangará

## El-Teknik søkir eftir fólki

Søkt verður eftir fólki at byrja skjótast gjørligt.

**Krøv:**
Elektrikkari ella tilsvarandi útbúgving.
Ert fyrikomandi og ágrýtin
Góð samstarvsevnir

**Vit arbeiða við:**
Virkisinstallatiónum
PLC-stýringum
Yvirvakin við PLC og SCADA

**El-Teknik kann bjóða tær**
Stóra avbjóðing í arbeiðinum
Fjølbroytt arbeiði
Samstarv við nógvar ymiskar kundar

Hevur hetta tín áhuga, ring so til Jákup Tróndheim 594419.

**El-Teknik Sp/f**
Tlf. +298 44 33 13 · Fax nr. +298 44 33 14
E-mail: elteknik@elteknik.fo
FO-520 Leirvík
Føroyar

## Aðalfundur

Lýst verður til aðalfundar, leygardagin 20. mai 2006, samb. lógum okkara um aðalfund.

Tíð og stað verður kunngjørt seinni.

**Ítróttasamband Føroya**

## Eysturoyar Fólkafloksfelag

Eysturoyar Fólkafloksfelag heldur ársaðalfund í Bygdarhúsinum í Leirvík týsdagin 2. mai kl. 19.30.

Nærri verður lýst seinni.

**Eysturoyar Fólkafloksfelag**

## Ársaðalfundur

Eigarafelagið Norðasta Horn hevur ársaðalfund tann 26. apríl 2006 kl. 20.00 í Býlingshúsinum. Skrá smb. lógum felagsins.

**Nevndin**
**Eigarafelagið Norðasta Horn**